# Bilar

Nr. 185 • hósdagur • 29. september 2005 • 79. árg.


# Skoda Octavia RS við 200 hk

**Á altjóða bilaframsýningin í Frankfurt, ið er í hesum døgum, presentarar Skoda toppmodellið í Octavia røðini, Octavia RS, við 200 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,3 sek**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*





*Skoda Octavia RS er toppmodellið í Octavia-røðini. Bilurin hevur 200 hk motor og koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,3 sek*

Tann Skoda Octavia, sum kom á marknaðin í 1996, var fyrsti nýggi Skoda eftir at VW-konsernin hevði yvirtikið kekkisku bilverksmiðjuna. Í fjør kom so Octavia í aðru generatión, og nú verður toppmodellið Octavia RS presenterað á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt, sum er í hesum døgum.

Skoda Octavia verður gjørdur sum hatchback við 5 hurðum og sum Combi, sum er stationcar útgávan, og tað eru hesir, sum nú eisini koma sum RS.

Octavia RS hevur 2.0 litur TFSI bensinmotor við 200 hk og einum snúningsmomenti sum 280 Nm. Toppferðin er 240 km/t, og bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,3 sek.

Bilurin er sportsligur bæði innan og uttan við t.d. spoilarum aftan og framman, síðupanelum og alufelgum. Octavia RS verður frumsýndur við nýggja litinum "Race blue", men koma seinni í hesum litum: gult, reytt, svart og silvur. Seinni kemur eisini ein 2.0 litur TDI PD diesel útgáva við 170 hk.

Octavia RS kemur á marknaðin síðst í hesum árinum.



*Octavia RS er ein sportsligur bilur við t.d. spoilarum aftan og framan, síðupanelum og alufelgum*

# Kvinnur betri bilførarar

**Tað er ikki nakað nýtt, at kvinnur eru nógv minni innblandaðar í fersluóhapp enn menn. Ein svensk kanning staðfestir eisini, at um menn koyrdu bil eins og kvinnur, vildu helvtina færri mannligir bilførarar doyð í ferðsluni**


FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Ein svensk kanning staðfestir, at um menn koyrdu bil eins og kvinnur, vildu helvtina færri mannligir bilførarar doyð í ferðsluni*

*Modellmynd: Lisa Lamhauge*
*Myndamaður: Jens Kristian Vang*

Um menn koyrdu bil sum kvinnur, vildu helvtina færri menn doyð í ferðsluvanlukkum. Tað staðfesti svenski granskarin Katarina Bokstrøm á einum ferðsluskeiði, sum var fyriskipað av NTF í Svøríki. NTF er nakað tað sama sum Ráðið fyri ferðslutrygd hjá okkum.

Hóast útrokningar taka hædd fyri, at menn koyra meira enn kvinnur, er tað ein sannroynd, at dupult so nógvir mannligir bilførarar doyggja í ferðsluni.

Ein frágreiðing er at menn m.a. koyra skjótari, standa fyri tí mestu rúsdrekkakoyringini og gloyma ofta at spenna trygdarbeltið.

Katarina Bokstrøm staðfestir út frá teirra kanningum, at talið á mannfólki, ið lata lív í ferðsluni, vildi fallið við yvir 30 prosentum, um teir yvirhildu hámarksferðina, ikki koyrdu ávirkaðir og spentu síni trygdarbeltir, skriva Sveriges Television á teirra heimasíðu.